# Norrøn gudalæra

Norrøn gudalæra er tað sama sum ásatrúgv. Ásatrúgvin var trúgvin hjá norðbúgvum í fornøld og víkingatíð. Í ásatrúnni vóru fleiri gudar. Gudarnir vóru býttir í tveir bólkar, æsir og jatnir. Æsirnir vóru teir góðu og búðu í Ásgarði. Jatnirnir vóru teir óndu og búðu í Útgarði. Menniskjuni búðu í Miðgarði.

Æsirnir royndu at hjálpa menniskjunum og gera gott, meðan jatnirnir royndu allatíðina at gera menniskjunum ilt. Æsir og jatnir vóru allatíðina í bardaga um tað góða og tað ónda.





**Óðin**

Óðin var hægstur av gudunum í Ásgarði. Hann var krígsgudur, deyðsgudur og vísdómsgudur. Fyri at Óðin skuldi gerast vísdómsgudur, mátti hann drekka úr **vísdómsbrunninum**. Men fyri at sleppa at drekka úr vísdómsbrunninum mátti hann lata annað eygað, og tí var Óðin einoygdur.

Óðin ráddi yvir eydnu og óeydnu hjá fólki, og hann kundi eisini gera av, hvør skuldi vinna í bardaga. Óðin átti eitt spjót, sum kundi fara ígjøgnum træ, stein og metal.

**Vísdómsbrunnur:** stórur tangi ella hol við vatni í. Fólk gjørdust klók, um tey drukku vatn úr brunninum



**Frigg**

Frigg var kona Óðin. Hon var ógvuliga klók, og Óðin spurdi hana ofta um góð ráð, tá hann skuldi taka truplar avgerðir.

Frigg var **hjúnarbandsgudinna** og verndari í sambandi við nógv arbeiði, sum konur gjørdu, eitt nú veving, seyming og matgerð. Frigg verður eisini ofta sett í samband við móðurkærleika.

**Hjúnarbandsgudinna:** gudinna, sum verjir og hjálpir hjúnum



**Tórur**
Tórur var elsti sonurin Óðins, men Frigg var ikki mamma hansara. Mamma Tór nevndist Jørð og búði eisini í Ásgarði. Tórur var ein týdningarmikil gudur, tí hann ráddi fyri veðrinum og kundi gera av, hvussu gróðurin var.

Tórur átti hamaran Mjølnir. Tá hann kastaði Mjølnir eftir onkrum, rakti hann altíð rætt og kom aftur til Tór.



**Siv**
Siv var kona Tór. Navnið Siv merkir kona. Siv var vakrast av øllum kvinnunum í Ásgarði og hevði gullhár.

Siv var gudinna fyri tí, sum **heystað** varð. Hon ráddi fyri, hvussu rík fólk gjørdust í sambandi við tað, sum kom burtuúr heystingini.

**At heysta:** vit heysta, tá ið vit sláa grasið ella taka eplini upp



**Loki**
Loki var vakur, men óndur og loyndarfullur. Hann dugdi gand og var altíð klárur at gera okkurt keðiligt ella ringt.

Loki var jatni, men slapp kortini at vera nógv saman við Óðini og Tóri í Ásgarði. Viðhvørt hjálpti Loki Óðini og Tóri og hinum ásunum, sjálvt um hann ofta gjørdi nógv ringt.



**Iðunn**
Iðunn var ungdóms- og kærleiksgudinna. Hon átti eina eskju, har hon goymdi nøkur gull súrepli. Hesi súrepli vóru nakað heilt serligt. Tá tey, sum búðu í Ásgarði gjørdust gomul, kundu tey fara til Iðunn og fáa sær ein bít av einum súrepli, og tey gjørdust ung aftur.



**Týr**
Týr var krígsgudur og ráddi mest fyri, hvør vann í bardaga. Hann var tann **djarvasti** av ásunum, og hann var ógvuliga sterkur. Týr hevði bert eina hond, tí hina hevði Fenrisúlvurin bitið av.

**Djarvur:** torir væl



**Froya**
Froya var kærleiksgudinna og ráddi fyri kærleika og deyða. Hon var millum vakrastu konur í Ásgarði. Froya var gift við einum manni, sum æt Óður. Einaferð fór hann á eina ferð og kom ongantíð aftur. Froya gjørdist kedd og fór at gráta. Tárini, sum komu úr eygum hennara, vóru úr reyðargulli.

Froya átti ein vogn, sum tvær kettur drógu.

# Norrøn gudalæra

Vel ein av gudunum ella gudinnunum at skriva um.



Hvussu eitur gudurin ella gudinnan?

Hvat heldur tú hendir á myndini?

Sig frá onkrum afturat um gudin ella gudinnuna.